## Málini skulu teljast við

FSF ætlar, at grein 5 í kappingarreglunum fyri fótbólt nú skal broytast. Hetta er greinin, sum ger av, hvussu støðan skal roknast, um lið hava sama stigatal.

Broytingin er, at nú skal málmunurin í innanhýsis dystum roknast við. Stendur eisini á jøvnum í hesum, er tað liðið fremst, sum hevur skotið flest mál á útivølli.

Hetta er ein broyting, sum hevur verið væntandi, um hugt verður eftir málsviðgerðini, tá greinin í síni tíð varð samtykt. At mál í innanhýsis dystum ikki komu við í lógartekstin ta ferðina, var snøgt sagt eitt mistak. Eitt mistak, sum eingin hevði hugsað um, fyrr enn HB og VB bara tvey umfør undan kappingarloki vóru ájøvn í stigum. Ein støða, sum hevði við sær, at Dómsnevndin hjá FSF tók málið upp av sínum eintingum, soleiðis at eingin ivi skuldi verða um, hvussu stigatalvan skuldi lesast.

**-mørk**

## Feløg kunnu missa loyvið

Talan skal nú verða um munandi strangari reglur viðvíkjandi loyvisgóðkenningini, sum FSF letur føroysku fótbóltsfeløgum. Talan er um krøv, sum UEFA hevur ásett, og sum í onkrum av limalondunum hava viðført mest sum kaotiskar støður. Eitt nú í Italia, har bæði Lazio og Roma hava verið í vanda fyri at verða tveitt úr kappingini.

So galið gongur tað vónandi ikki í Føroyum. Men FSF skjýtur upp, at feløg, sum ikki lúka ásettu treytirnar, nú kunnu fáa noktað luttøkuloyvi í Formula-deildini.

## Fundast um Futsal

Hesa vikuna fundast tey 52 limalondini í UEFA um innandurafótbólt, sum skal hava hægri raðfesting. Spælið Futsal fær alsamt størri undirtøku, og nú ætlar UEFA meira miðvíst at skipa fyri kappingum í hesum spæli. Futsal er innandurafótbóltur, har grundarlagið er tekniskur fótbóltur fram um kropsligar nærdystir.

Rúni Heinesen og Pætur Clementsen umboða FSF á fundinum, sum verður hildin í Madrid.

**ek**

# Neyðugt við broyting í FSF

**– Vit halda, at tað er neyðugt við eini broyting í Fótbóltssambandinum, og ein nýggjur formaður kann virka fyri hesari broyting, sigur Tórálvur Stenberg, formaður í AB. Felagið á Argjum ætlar sær at atkvøða fyri Birgir Enghamar sum nýggjan FSF-formann**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Argja Bóltfelag var eitt av teimum feløgunum, sum var við til at skjóta Birgir Enghamar upp sum nýggjan formann í Fótbóltssambandið, og AB ætlar sær eisini at halda fast um hendan stuðulin á aðalfundinum hjá FSF leygardagin.

– FSF hevur koyrt í einum spori í nógv ár, men nú er neyðugt við einari broyting. FSF áleggur bara feløgunum fleiri og fleiri krøv, og tað hava feløgini truput við at liva upp til. Tí eiga feløgini at verða styrkt við pengum, sum føroyskur fótbóltur fær uttanífrá, sigur Tórálvur Stenberg, formaður í AB.

### Tyngri at reka felag

Hann er ein í tí skjótt vaksandi talinum av føroyskum fótbóltsformonnum sum halda, at krøvini til feløgini gerast alsamt truplari at liva upp til.

– FSF hevur lønt skrivstovufólk til arbeiðis, meðan feløgini ikki hava nakað lønt fólk. Hetta hevur við sær, at formenninir, sum onga løn fáa, skulu renna runt fyri at tryggja, at feløgini liva upp til tey mongu krøvini, sum FSF vegna UEFA setir feløgunum, sigur Tórávlur Stenberg.

– Hetta ger tað bara tyngri og tyngri at reka eitt fótbóltsfelag, og tí halda vit, at tað er umráðandi at styrkja feløgini fíggjarliga, so tey kunnu klára tey mongu nýggju krøvini.

### Stuðla Birgir

Birgir Enghamar hevur júst havt hetta mál sum eitt av sínum sentralu í valstríðnum undan aðalfundinum leygardagin. Hann heldur, at fáa feløgini ikki ein styrk, so verður trupult hjá nógvum at hóra undan í longdini.

Fyrrverandi HB-formaðurin heldur, at føroyskur fótbóltur er komin á eitt vegamót, og at tað gerst alsamt truplari at fáa fólk at taka við ábyrgd í teimum ymsu feløgunum. Tí heldur hann, at FSF skal hjálpa feløgunum at liva upp til tey mongu krøvini.



*– Hetta ger tað bara tyngri og tyngri at reka eitt fótbóltsfelag, og tí halda vit, at tað er umráðandi at styrkja feløgini fíggjarliga, so tey kunnu klára tey mongu nýggju krøvini, sigur Tórálvur Stenberg, formaður í AB*

– Birgir hevur ført fram síni sjónarmið um hetta mál, og vit taka undir við tí, sum hann hevur sagt. Her má ein broyting til, og vit stuðla Birgir í at fremja hesa broyting, sigur Tórálvur Stenberg.

# Pengarnir loysa ikki trupulleikan

**– Vit halda ikki, at føroyskur fótbóltur fær tað betri, um FSF letur meira pening til feløgini. Og sum heild halda vit, at Óli Holm hevur gjørt eitt gott arbeiði, eru boðini úr Klaksvík, har tey ætla at geva Óla Holm sína atkvøðu**

FSF-VAL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

KÍ var ikki millum tey feløg, sum skrivaðu undir uppskotið um at stilla Birgir Enghamar upp til formansvalið í FSF.

Orsøkin til hetta hevur sum so einki við nýggja valevnið at gera. Men John William Joensen, pressutalsmaður hjá felagnum, sigur, at tey ikki duga at síggja nakra serliga orsøk at skifta verandi formannin út.



*Samstarvið hevur gingið væl, og við at nýta pengarnir til landsliðsarbeiðið skapar FSF eisini menning úti hjá feløgunum, eru boðini úr Klaksvík, har atkvøðan leygardagin fer til Óla Holm*

– Vit hava havt eitt fínt samstarv við bæði Óla Holm og Birgir Enghamar. Og vit hava sum so bara alt gott at bera teimum báðum.

– Til tíðir hevur arbeiðið innan FSF tókst heldur rokmikið. Men hesi seinastu tvey árini hevur talan verið um arbeiðsfrið og gott samstarv. Og tá so er, so halda vit tað hava týdning, at stabiliteturin í arbeiðinum verður varðveittur. Í øllum førum halda vit ikki, at tað kann vera nakað endamál í sjálvum sær at skifta leiðsluna út, sigur hann.

### Landsliðini skapa menning

Stuðulin til verandi arbeiðssetning innan FSF tykist eisini koma greitt til sjóndar, tá tosað verður um tað, sum hevur verið ført fram higartil í valdystinum.

– Stórur partur av ónøgdini hevur snúð seg um, at feløgini ynskja ein størri part av fíggjarligu inntøkunum hjá FSF. Men tað er so ikki okkara áskoðan, at tað loysir nakrar trupulleikar, um pengarnir floyma úr FSF-kassanum yvir til feløgini.

– Partvíst, so haldi eg avgjørt, at vit í dag síggja nyttuna av miðvísa landsliðsarbeiðinum, sum hevur verið gjørt. Tá vit trinu inn á altjóða pallin, so sóu vit fyri tað nógva alt landsliðið standa í brotsteiginum og sparka burtur. Í dag hava vit spælarar, sum eru skúlaðir upp við altjóða avbjóðingum, og tað sæst heilt avgjørt aftur í betraðum landsliðsavrikum.

Samstundis er hetta eisini nakað, sum kemur feløgunum tilgóðar. Nakað sum eitt nú var sjónligt í UEFA-Cup dystunum, sum B36 spældi í ár.

– Hartil kann tað ikki vera nøkur haldgóð loysn, at feløgini fara avstað við teimum inntøkum, sum FSF fær úr altjóða luttøkuni. Sum føroyskur fótbóltur er skipaður, so vilja øktar inntøkur at kalla bara fara til øktar lønarútreiðslur til spælarar, og tá fara pengarnir úr føroysku fótbóltsskipanini. So halda vit, at nyttan er munandi størri, um pengarnir verða nýttir í einum arbeiði, sum gagnar øllum føroyskum fótbólti. Landsliðsarbeiðið gevur jú eisini bestu spælarunum nakað at stremba eftir, og á tann hátt fáa feløgini eisini nakað burtur úr hesum, staðfestir John William.

# Start umhugar graslíki

**Norska felagið Start umhugsar nú, um tað skal leggja graslíki á nýggja leikvøllin hjá sær, sum verður bygdur í løtuni**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Nýggjastu graslíkisvøllirnir verða alt meira útbreiddir úti í heimi, og tað er blivið meira vanligt, at eisini dystir av ymsum slagi verða spældir á hesum vøllum. Eitt nú verða fleiri dystir í Royal League spældir á graslíki, tí grasvøllirnir ikki eru í nóg góðum standi hesa ársins tíð.

Norska felagið Start, har Todi Jónsson er ein av spælarunum, umhugsar nú at leggja graslíkið á nýgga leikvøllin hjá sær í Kristianssand.

Avgerðin verður tikin fyrsta dagin, og tað verður mett sum sannlíkt, at Start frá 2007 fer at spæla allar sínar heimadystir á graslíki.

Onnur norsk feløg umhugsa eisini at fara yvir til graslíki á sínum nýggju vøllum.

Loyvini at brúka graslíki eru blivin meira víðfevnd, eftir at nýggjastu vøllirnir eru farnir at líkjast vanligum grasi alt meira.